# Tutl hevur aðalfund



Plátufelagið Tutl hevur aðalfund í Miðlahúsinum í Vágsbotni leygardagin 15. september kl. 16.00, og tá verða limir felagsins, ið eru tey, ið hava givið tónleik út á plátufelagnum kunnaðir um ætlanirnar hjá felagnum, og ætlaninar eru stórar, eitt nú er ætlanin at seta fýra fólk í starv, og virka fyri at gera Tutl til ein leikara á altjóða tónleikapallinum.

# Vænta onga fólkapensjón

Nógvir danir vænta ikki, at tað almenna fer at rinda teimum fólkapensjón, tá tey eina ferð røkka tí aldrinum. Ein spurnarkanning vísir, at av teimum, sum nú eru millum 18 og 34 ár, eru tað bara fimm prosent, sum vænta at fáa fólkapensjón. Tey, sum eru komin eitt sindur longri upp í árini, vænta harafturímóti at fáa gagn av verandi skipan. 75 prosent av teimum, sum eru farin um tey 56, vænta sær fólkapensjón, tá tey koma í tann aldurin.

# Úr fótbóltinum á tónleikapallin



*Eftir, at Uni Arge hevur lagt gaggurnar á hyllina, hevur hann fingið stundir at arbeiða við tónleikinum, og gera dreymin um eina fløgu undir egnum navni til veruleika*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hann er kendur sum málvandamikil framherji hjá HB og á landsliðnum, sum tíðindamaður, samskiftisfólk og seinastu tíðina sum sjónvarpsvertur í FSF-varpinum, Men Uni Arge er eisini inniligur sangskrivari og sangari, nú er fyrsta útgávan hjá Una á trappunum**

ÚTGÁVA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrrverandi málrevurin hjá HB, Uni Arge hevur seinastu tíðina arbeitt við síni fyrstu egnu tónleikaútgávu. Fløgan, ið verður tikin upp og ljóðblandað í JakZac Studio, verður væntandi í handlunum í oktober.

- Tilfarið á fløguni er melodiskur fólkatónleikur við einum sterkum ráka av poppi og rokki, sigur Uni Arge.

Á fløguni eru tilsamans 12 sangir, sum Uni sjálvur hevur sett orð og løg til. Teir snúgva seg m.a. um kærleika, skilnað, friðsælu, mótfalni, framfýsni, óvissu, vegamót, veður og jantelóg. Dentur er lagdur á, at tekstir og tónleikur skulu sita, svinga og røra, greiður Uni frá. Upprunaliga hevði Uni eini 30 løg at velja millum, men í samstarvi við framleiðaran hevur Uni skorið talið niður á hesi 12 løgini.

## Ikki óroyndur á tónleikapallinum

Hóast Uni er betri kendur úr øðrum sambondum, so sum málvandamikil framherji hjá HB og á landsliðnum, sum tíðindamaður, samskiftisfólk og seinastu tíðina sum sjónvarpsvertur í FSF-varpinum, so er Uni ikki spildurnýggjur á tónleikapallinum. Umframt at vera framúr góður undirhaldari við gittaranum í sosialum samanhangum, so hevur hann fyrr gjørt sangir við ymisk høvi. Á fløguni "Síðsta skríggj" hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá 1997 gjørdi Uni allar 13 sangtekstirnar, og á HB 100-fløguni frá 2004 gjørdi hann orð og lag til tríggjar sangir. Eisini havi Uni onkuntíð gjørt vísur til útvarpssendingar.

## Stundin var komin

Uni Arge greiður frá, at hann helt stundina vera komna at gera eina heila fløgu í egnum navni.

- Eg havi leingi ætlað hetta, men fekk ongantíð stundir, tá eg spældi fótbólt.

Í fyrstu syftu er ætlanin at geva fløguna út í Føroyum, men kannað verður, um marknaður er fyri tilfarinum í Íslandi. Um hetta vísir seg, er ætlanin eisini at marknaðarføra og selja fløguna har.

- Eg spældi fótbólt í Íslandi frá 1998 til 2000, so onkur sambond havi eg tann vegin, sigur Uni.

## Royndir hjálparmenn

Fløgan er skapt í samstarvi við eina aðra gamla fótbóltshetju, HB'aranum og NSÍ'aranum Niclasi Johannesen. Niclas, ið fyri skjótt nógvum árum síðan býtti gaggurnar um við gittaran er framleiðari á fløguni og spælir eisini gittar. Løgini eru løgd til rættis av Una, Niclasi og manninum handan JakZac Studio Jákupi Zachariassen Teir tríggir spæla eisini gittar á fløguni. Trummur og bass spæla James Olsen og Jóhannus á Rógvu Joensen.

Á myspace síðuni hjá Una myspace.com/uniarge, liggur nú eitt filmklipp, har Uni bjóðar innar í upptøkuhølið, har hann saman við Kristoffur Mørkøre er í ferð við at ljóðblanda fløguna. Uni spælir løg av fløguni og greiður eitt sindur frá um, hvussu fløgan er blivin til.

SKEIÐ

## Ferðsluavmerking

Eftir 1. januar 2008 skulu allir arbeiðstakarar/entreprenørar, SEV, kommunur og onnur, ið arbeiða fyri Landsverk ella grava í ella við landsveg hava prógv í ferðsluavmerking. Hetta verður eitt krav.

Landsverk skipar tí saman við Vejsektorens Efteruddannelse fyri skeiði í ferðsluavmerking á Hotel Hafniu 1-2. oktober og aftur 3-4. oktober 2007.

Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjum skeiði.

**Tekning**
Boðast skal frá luttøku á t-post adressu jno@lv.fo í seinasta lagi 14. september 2007. Tekningin er bindandi. Vinarliga upplýsið arbeiðspláss, navn, starvsheiti og p-tal.

**Kostnaður**
Íroknað skeiðsgjaldið á kr. 6.000 er skeiðstilfar og matur. Peningurin skal flytast á kontu nr. 9181-128.220.6 í Eik Banka.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi og havna myndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*